VIÐMERKINGAR

Havnin, SEV og orkan

Klæmint Olsen
Listi D - Sjálvstýrisflokkurin

VAL04

Spillhitin frá Sundsverkinum eigur ikki at hita Kaldbaksfjørð, men koma til høldar sum fjarhiti. Sum størsta kommuna í landinum eigur Havnin at orða sín egna orkupolitikk.

Eitt av valevnum Tjóðveldisfloksins skjýtur upp, at Havnin meldar seg úr kommunala elfelagnum SEV. Eg haldi ikki, at løtan er tann rætta. Samstundis skilji eg tó væl Johan Mortensen. SEV hevur við sínari monopolstøðu ligið tungt á øllum orkupolitikki í Føroyum.

Vend tykist tó at vera komin í. Kemst hetta av trimum ávum:

- Landsmyndugleikin hevur loksins fingið áhuga fyri orkumálum og er farin í holt við at orða ein orkupolitikk; hetta leggur eitt tiltrongt trýst á SEV;
- SEV er broytt seinasta árið, tí hægsta vald SEV's, umboðsnevndin, og formaður hennara vildu hava broytingar; SEV gerst nú opnari, og leiðslan er farin at hugsa øðrvísi;
- Fjølmiðlarnir og almenningurin hava sýnt alt størri áhuga fyri økinum.

Undirritaði hevur í 16 ár umboðað Tórshavnar kommunu í umboðsnevnd SEV's. Eg havi verið atfinningarsamur, kanska til tíðir í so atfinningarsamur. Í dag kann eg ikki annað enn gleðast. SEV er veruliga farið at hugsað øðrvísi, og almenningurin fær í dag innlit í avgerðirnar og grundarlagið undir teimum. Fundirnir eru vorðnir opnir.

Eg eri tó ikki givin at finnast at SEV. T.d. dámdi mær ikki, at nýggju stjórastørvini vórðu sett innanhýsis, og enn er eingin avklæring viðvíkjandi tí framhaldandi vatnorkuútbyggingini í Eysturoynni.

Eingin ivi er tó um, at SEV hevur uppbygt eina stóra vitan, og at SEV hevur nógv góð fólk í starvi. SEV má tó brynja seg til broytingar. Í tann mun tað ber til, vil landsmyndugleikin helst avtaka monopolið. Og tað man vera tað rætta.

Havnin er nógv tann størsta kommunan í SEV. Havnin fer at hava 20 limir í komandi umboðsnevnd, sum tilsamans fer at hava einar 65 limir. Harvið gerst býtið eitt sindur meira javnt, men Havnin verður framhaldandi ein minniluti. Tað eigur hon sjálvsagt at vera við sínum 40% av Føroya fólki, men umboðanin verður tó rættvísari, enn hon er í dag.

Sum nógv tann størsta kommunan eigur Havnin at hava sín egna orðaða orkupolitikk. Ikki bara fyri at geva SEV eitt ávíst mótspæl, men tí kommunan sjálv nýtir nógva orku, og tí vit eru tað pláss í Føroyum, har flestu og størstu útbyggingarnar fara fram.

Havnin eigur at gerast ein grøn kommuna eins og Vestmanna. Eyðsýnd mál at tikið upp í hesum sambandi kundu verið 'dálkingin frá bussunum' og 'vegaljósini'. Kundi okkurt ikki verið spart her?

Nógvir nýggir stovnar og nógv nýggj bústaðarøki eru komin í Havn seinnu árini, men hevur nakrantíð verið hugsað um alternativa orku, so sum jarðarhita ella sólsellur. Eg haldi ikki.

Og sjálvsagt eigur fjarhitaskipanin at verða knýtt til Sundsverkið sum skjótast. Alt annað er púrasta burturvið.

Fleiri leigutraðir og urtagarðsøkir

Hans Albert Hansen
Hoyvík
Valevni sambandsfloksins

Bíðilistin við fólkum, ið ynskja sær leigutraðir er langur, og hetta má nakað gerast við nú!

Nógvum føroyingum dáma væl at fáast við jarðarbrúk, seyðahald og líknandi. Hesi ítriv, sum eru ein partur av okkara mentan, hava ring kor í høvuðstaðarøkinum, tí útbyggingin av Havnini gevur lítið rúm fyri hesum. Havnar kommuna eigur sum skjótast at finna økir í kommununi, ið kunnu leggjast út sum leigutraðir og smærri urtagarðsøkir, har fólk kunnu hava nakrar gæs og dunnur gangandi ella kanska velta sær nøkur epli. . Hetta kann verða eitt andarhol í tí annars so strongda gerandisdagnum hjá fólki umframt eisini eitt kærkomið ítriv hjá eldri fólki. Somuleiðis tryggja vit eina vakra og fjøltáttaða kommunu við nógvum grønum blettum. — Fái eg tína atkvøðu, ert tú eisini komin nærri hesum máli.

Ungdómur og vísdómur

Jógvan Arge
býráðslimur fyri Tjóðveldiflokkin

VAL04

Eitt blómandi mentanar- og ítróttarlív hevur alstóran týdning fyri trivnaðin í Tórshavnar kommunu. Samstundis er umráðandi, at børn og ung fáa góða ansing og skúlagongd.

Tjóðveldisflokkurin hevur sett sær fyri, at hesir samfelagstættir fáa bestu sømdir og karmar.

Í samráð við mentanarlívið virka vit fyri at útvega eitt nú tónleikarum góðar framførslu- og venjingarumstøður. Vit virka eisini fyri mentaskúla fyri dansi, leiklist, myndlist og skrivilist.

Tjóðveldisflokkurin ásannar tann stóra týdning, sum kropsvenjing og ítróttur hava.

Tí eigur kommunan at gera sær greitt, hvar framtíðar ítróttarøki skulu verða, so farast kann undir at menna umstøðurnar soleiðis, at eitt nú Oyggjaleikir við sínum fjølbroyttu ítróttagreinum aftur kunnu haldast í Føroyum.

Vit seta okkum fyri, at málið um ítróttarvøll til frælsan ítrótt verður loyst, og at fólkaítróttini fimleiki verða útvegaðar hallarumstøður til venjing og kapping á altjóða stigi.

Nú ítróttarhøll er bygd í Hoyvík og í Kollafirði, verður farið undir ítróttarhøll á Argjum.

Tjóðveldisflokkurin strongir á at dagføra kommunalu skúlarnar til at lúka krøvini í nýggju fólkaskúlalógini. Vit stuðla nýggjum skúla í Hoyvík og seta Argja Skúla á breddan.

Umstøðurnar hjá næmingunum at eta á skúlunum verða bøttar munandi. Royndarskipanin við sunnum mati á skúlunum verður at fevna um allar skúlarnar.

Barnaansingin verður ment og skipað verður fyri systkinaavsláttri á dagstovnum og frítíðarskúlum. Øllum børnum í 1., 2. og 3. flokki skal standa í boði frítíðarskúli.

Vit mæla eisini til, at kommunan orðar ein ungdómspolitikk við denti á fjølbroytt tilboð, har ung sjálv eru uppi í at skipa fyri.

Til tess at seta hol á hetta arbeiði leggja vit dent á, at álit verður gjørt um viðurskifti teirra ungu, ið gjølla lýsir, hvørjum stigum og átokum tørvur er á.

X við E.

Staðbundu nevndirnar og Tórshavnar Býráð

Annfinn Brekkstein
valevni Sambandsfloksins til býráðsvalið

VAL04

Nú Suðurstreymoy verður ein kommuna, hava bygdirnar, sum hava lagt saman við Havnini, innbygt í samanleggingarsáttmálan at hava staðbundnar nevndir.

Uppgávan hjá hesum nevndum er at ráðgeva og vegleiða býráðið í ymiskum málum og at kunna borgarstjóran og harvið býráðið um, hvat rørist í bygdunum, hesar nevndir umboðað. Eisini eiga hesar nevndir at verða kunnaðar og at fáa høvi til at vegleiða og koma við meiningum, tá stórar broytingar verða framdar í teirra bygdum.

Tey fólk, ið nú verða vald í nýggja býráðið, hava skyldu til at fylgja við í allari kommununi, frá tí norðastu og út á smáplássini Hest, Koltur og Nólsoy o.s.fr.

Skulu fólkini í hesum bygdum kenna seg sum part av stóru kommununi, javnbjóðis við tey í meginøkinum - hetta er uppgávan hjá tí nývalda býráðnum at syrgja fyri, nevnliga at servisera allar borgarar líka í allari kommununi - setir tað krøv til tey fólkavaldu, nevnliga at fáa samansjóað allar borgarar í nýggju kommununi, so øll fáa javnbjóðis rættindi, óansað hvar tú býrt í kommununi. Tá ber av sonnum til at tosa um nærdemokrati.

Tað er ikki rætt at útdelegera heimildir til tær staðbundu nevndirnar, tí tá vendir samanleggingin á høvdinum. Hinvegin kundi nývalda býráðið havt eina felagskonto á figgjarætlanini, sum var oyramerkt til smáplássini. Ella rættari sagt: til menning og trivnað á smáplássum. Tað kundi verið eitt hugskot.

Allir borgarar í kommununum, sum hava lagt saman við Tórshavnar kommunu, verða nú borgarar við somu rættindum og somu skyldum sum allir aðrir í felagsskapinum. Vit koma at fáa og njóta, missa og svíða, í sama lagi og í góðum og rættvísum samstarvsanda og solidaritetsfatan. Hetta skal vera eyðkennið hjá tí nýggju Tórshavnar kommunu, tí tá hava vit eitt sterkt demokratiskt fólkaræði.

Men lat okkum ongantíð gloyma, at tað eru teir fólkavaldu býráðslimirnir, sum eru valdir at umboða alt fólkið í tí nýggju Tórshavnar kommunu.

Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Inntøkumøguleikar

Hans Sørensen
listi C

VAL04

Skaldið sigur, "einaferð enn skalt tú menna teg, Tvøroyri". Nú haldi eg, tíðin er komin til tess. Vit hava fingið nýggja stásiliga havn og fáa nýtt ferðamannaskip fyri 340mill, so møguleikarnir til ferðavinnuna skuldi verið góðir. Kunningarstovan skal bróta upp um ermar og fáa lýst okkara vøkru oyggj. Vit skulu hava nógv ferðafólk hendan vegin, bæði við Smyrli og øðrum stórum ferðamannaskipum, sum í dag koma inn á Havnina. Hvat hevur Havnin at vísa á, sum vit ikki hava? Hesi skip, sum eru um 40.000 BT til støddar, leggja um 80.000 kr eftur sær bert í havnagjøldum. Kann nevna, at tað komu 47 skip av hesum slag inn á Tórshavn í ár. Nú nýggi Smyril kemur, skilji eg ikki, hví eingin tungoljutangi er komin upp at standa. Í hvussu er, skal nýggi Smyril hava tungolju og tað kann ikki vera ætlanin, at hann skal inn á sund at bunkra; hugsi her um arbeiðspláss, inntøkur av vørðuavgjaldi og tílíkt. Skuldi ferðamannaskipini so eisini komið á fjørðin, so kundi hetta bert bøtt um, hvat vit høvdu at bjóða. Eisini haldi eg, at ein bátadráttur manglar við nýggju havn, her hugsi eg serliga um Jóansøkutíð.Eg hevði lovað mær sjálvum ikki at tosa um seyð hetta valstríðið, tí hann hongur mær so langt út av hálsinum. Men tá maður segði fyri mær, " at hann valdi ongan sum nú sat í býráðnum, ongan sum hevði seyð, og tað var ein stórur spurningur um hann valdi nakran sum hevði hjall", so kundi eg ikki lata vera..

Fjølmiðlar og valevnir

Jan Poulsen
Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð

VAL04

Tað frøddi meg at síggja í Degi og Viku mánadagin, at Tingformaðurin, Edmund Joensen, sýtti løgtingsmonnum sum eisini stillaðu upp til bý- og bygdaráðsvalið, at seta fram munnligar spurningar av Tingsins røðarapalli.

Hetta hevði hann gjørt, tí at løgtingslimir sum vóru uppstillaðir, alla tíðina komu upp á røðarapallin og vildu "profilerað" seg so, at øll sum hugdu at Tingvarpinum í Sjónvarpi Føroya, skuldu leggja merki til teir.

Gott var at síggja, at Tingformaðurin gjørdi bart í hesum, og tað skal hann eiga takk fyri.

Menn so seinni í sama innslagið í Degi og Viku, hevur tíðindamaðurin hjá Sjónvarpi Føroya, Grækaris D. Magnussen, eina samrøðu við ein av sínum egnu starvsfeløgum, - skal lata vera við at nevna navn hansara her, so hann ikki fær meira reklamu her -, sum sleppur at tosað út í eitt í uml. 3 minnuttir, um hvussu rættvísur hann er í mun til onnur valevni. At hann fyri 2-3 mánaðum síðani hevði gjørt vart við, at hann stillaði upp, og tískil ikki kundi vera á skíggjanum meira. Seinast í innslagnum segði hann so, eftir at vera spurdur, " eg spæli altíð við opnum kortum". Ja, eg meini tað.

Hesin tíðindamaðurin og valevnið, fekk sostatt ta bestu reklamu, sum ein kann fáa uttan so mikið sum at gjalda eitt klovið oyra fyri tað, ímeðan onnum valevnir skulu gjalda í dýrum dómum fyri sovorðna reklamu.

Haldi at hetta var á sera lágum støði frá Sjónvarpsins síðu.

Kundi eisini hugsa mær, at Sjónvarp Føroya tosaði við meg um hetta, at ikki sleppa framat, tí ein er uppstillaður til kommunuvalið.

Eri nú eftir hondini fastur fúsur týsmorgun í sendingini "Góðan Morgun Føroyar" í Útvarpi Føroya, har eg havi svarað spurningum um ferðslu. Men tá hesar sendingar aftur skuldu byrja í vetur, segði eg í september mánaði Útvarpi Føroya frá, at ætlanin var at stilla upp til Kommunuvalið, og varð tað tí avrátt, at onkur annar skuldi svara spurningum ístaðin.

Um Sjónvarp Føroya hevur hug, so eru teir vælkomnir at tosað við meg eisini um hetta málið.

Vel trivnaðin — tað geri E!

Marianna Heinesen
Valevni Tjóðveldisfloksins til Tórshavnar Býráð

VAL04

Hvat bjóðar tú?
Er ein spurningur, ið eg ofta fái í hesum døgum. Er býráðsvalið blivin ein handilsvøra? Um so er, kann tað vera stuttligt at vera borgari í Tórshavnar Kommunu í hesum døgum. Tilboðini regna oman yvir øll ættarliðini um alt millum himmal og jørð. Tað kann ikki annað enn ørkymla veljararnar, og úrslitið er, at bert tey fáu tíma at lesa valgreinir ella lurta eftir valevnunum, tí samanum tíkið siga øll seg vilja tað sama!!!

- Tey eldru skulu virðast — fleiri alternativar íbúðarloysnir!
- Betri sømdir til tey ungu — fleiri ungdómshús í nærumhvørvinum!
- Fleiri grøn økir í Havnini — hugsið um trivnaðin til alla familjuna!
- Betri býarplanlegging — stegðið byggióskilinum, sum nú valdar!
- Størri gjøgnumskygni í avgerðum og ætlanum — virðið borgaran!
- Ferðslan skal verða tryggari — fleiri gongubreytir! (M.a. út á Hamaran á Argjum!)
- Bussleiðin betrast — so trygt kann ferðast til og frá Kollafjørð ella Kirkjubø, uttan at skula biða um innivist!
- Hugsið um súkkluna, sum eitt alternativt til bilin —hon dálkar og larmar enn minni! Tað ber til, ikki so?

Hetta ynski E!
Eg kundi hildið áfram við øllum, sum vit valevni varpa ljós á. Men hvat er so galið við tí? Hetta er alt øki og evni, ið viðkoma okkum øllum.

- Øll ynskja vit at búgva í eini kommunu, sum *arbeiðir* fyri okkum øll!
- Í eini kommunu, sum *raðfestir eftir tørvinum* hjá borgaranum!
- Í eini kommunu, ið *virðir* sínar borgarar!
- Í eini kommunu, ið *lurtar* eftir borgaranum!
- Í eini kommunu, ið er *opin og fyrikomandi* fyri ein og hvønn!

Hetta haldi **E** er ein góð kommuna!

Vel trivnaðin — tað geri E!
Tað er eitt krav til komandi leiðslu at raðfesta trivnaðin í kommununi! Trivnaðurin kann ikki beinleiðis síggjast, hann kann merkjast! Trivnaðurin skal vera eitt alternativ til allar borgararnar í kommununi! Har trivnaðurin verður raðfestur høgt, sæst nødsemi aftur í krónum og oyrum!

Hvør kann? — E kann!
Ein býráðslimur kann ikki gera so nógv, men í einum meiriluta í eini býráðssamgongu verður møguleikin so nógvar ferðir størri! *Tjóðveldisflokkurin* bjóðar ein sterkan valevnislista fram — øll eru vit til dystin fús. Øll vilja vit, at kommunan skal tæna BORGARANUM og ikki umvent!

Komið og gerið nakað við raðfestingina — tað fari E!

Gott val!

Ein góð kommuna

Meta C. Palle
Valevni Javnaðarfloksins til Býráðsvalið

VAL04

Um tú gongur tær ein túr í býnum, t.d. í plantasjuni, framvið Havnará ella eftir teimum mongu gøtunum ímillum býarpartarnar, kann tú gleðast yvir tey grønu økini, sum eru eru í býnum. Eg vil arbeiða fyri, at tað verða fleiri av slíkum.

Fyri fáum árum síðani plagdi Tórshavnar kommuna at skipa fyri einum árligum ruddingardegi, har borgarar í øllum aldri høvdu møguleika fyri at rudda tey grønu økini. Tað hevði verið eitt gott hugskot, at hesin siður bleiv tikin uppaftur.

X við lista C.

Bústaðir til øll

Páll Petersen

VAL04

Øll hava vit brúk fyri bústaði. Tey flestu ynskja egið hús, nøkur ynskja íbúðarbygging, og onnur ynskja ikki at eiga, men leiga.

Nógv er bygt í Havnini tey sístu árini, og er hetta at frøðast um, men enn er tørvurin tó ikki nøktaður.

Í teimum bygdunum ið eru komnar afturat Tórshavnar kommunu, er stórur mangul uppá grundstykkir. Hetta er nakað sum má takast í størsta álvara, í øllum bygdunum í kommununi, fyri at tey ungu, ið búleikast á bygd, ikki kenna seg noyddan til at ríma av bygdunum vegna manglandi útstykkingar.

Hetta gerst best við at seta ein sterkan fólkaflokk í býráðið tann 9. november.

X við lista A

Ítróttur og mentanarpolitikkur

Rasmus A. Joensen
valevni hjá Sambandsflokkinumí Tórshavnar kommunu

VAL04

Vit ásanna, at býráðið saman við áhugafeløgum hevur gjørt nógv fyri tey ungu í Tórshavnar kommunu.

Í kommununi eru fótbóltsvøllir, hondbóltshallir, svimjihyljar, skúlahallir, høli til tónleikavenjingar, høli til ungdómsarbeiði og mong onnur høli til fleiri aktivitetir.

Men tørvurin er neyvan nøktaður, tí mong eru áhugafeløgini í kommununi og kommunan mennist alla tíðina, eins og alt livandi. Krøvini, eftirspurningarnir og tørvurin broytist alla tíðina.

Kommunan, tað eru fólkini í kommununi og býráðslimirnir, eiga tí eisini í framtíðini, at hyggja at hesum økjunum og ikki minst, vit eiga at fylgja við tørvinum og kanna teir møguleikar, ið stinga seg upp, tá einstaklingar ella bólkar, koma við uppskotum um tiltøk.

Ítróttur og mentan menna

Mennist í ítrótti og mentan